# Svumu úr Føroyum til Noreg



Hesir 24 svimjararnir vóru við á ferðini hjá Skeggjum, og teir løgdu 158.036 metrar aftur um bak



**Svimjarar hjá svimjifelagnum Skeggjum úr Gøtu svumu í samfullar fimmti tímar umborð á Norrönu**

SVIMJING
*Stefan í Skorini*

Tá Norröna loysti frá bryggju í Havn seinasta mánamorgun við kós ímóti Lerwick í Hetlandi vóru 24 svimjarar í aldrinum 10-16 ár úr svimjifelagnum Skeggjum við á ferðini.

Ætlanin var at svimja út í eitt í tí lítla hylinum umborð á skipinum á túrinum úr Tórshavn umvegis Lerwick til Bergen og heimaftur.

Svimjararnir svumu tilsamans 158.036 metrar. 79.708 metrar á veg til Bergen og 78.328 metrar á heimferðini.

Hylurin er bert 6,45 metrar til longdar, so tað skuldu nógvar longdir til fyri at náa hesum máli.

### Stuðulssvimjing

Endamálið við svimjingini var at fáa penging til vega til felagið. Privatpersónar og fyritøkur høvdu frammanundan bundið seg til at rinda eina ávísa upphædd fyri hvønn meturin.

Sørin Olsen er venjari hjá svimjarunum, og hann var sera væl nøgdur við tiltakið. Ætlanin var annars at fáa hetta metið við í Guinnes metbókina, men hon boðaði frá, at áhugi var ikki fyri at seta hetta metið í bókina.

Einasti trupulleikin var, tá tað rullaði illa. Tá vórðu svimjararnir næstan tveittir úr hylinum, men eingin vandi var tó á ferð.


Tann stóri Harmonikutúrurin
við Norrönu frá 1. - 3. september

MiniCruise



Pauli og Fimmboði skipa fyri!

Njót okkara stásiliga luksusskip á harmonikutúrinum til Noregs!

úr 800,-

Ferðaseðlakostnaður fyri hvønn aftur og fram

| | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 800 | 900 | 1000 | 1200 | 1400 | 1700 |

SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

team85


# FM í 30 km einkultstarti

SÚKKLING
*TíÝindaskriv*

Leygardagin 16. august verður kappast í 30 km einkultstarti. Hesaferð stendur kappingin bert millum unglingar og vaksin.

Tórshavnar Súkklufelag hevur aftur hesa ferð valt at súkkla sama teinin, sum kappast hevur verið á seinastu nógvu árini. Teinurin er úr Havn til Kaldbak og aftur til Havnar.

Startur og mál er við Plantusøluna við Hvítanesvegin. Vent verður nakað áðrenn »nýggja« byggistigið í Kaldbak.

Ein orsøk til at koyrt verður sama tein er sjálvandi fyri at hava møguleika at samanbera tíðirnar ár eftir ár, og fylgja við um menning er innan súkklingina.

Sterka síðan hjá Rógva Johansen er avgjørt einkultstartur, og hann eigur tí metið á hesum 30 km langa teini. Metið er 41 minuttir og 5 sekundir. Men væl gekk hjá Gunnar Dahl-Olsen og Sverra Mohr Edvinsson í fjør og megnaðu teir báðir at betra um sítt persónliga met so mikið, at hesir nú eru tætt við bestu tíðina hjá Rógva.

Gunnar koyrdi teinin uppá góðar 42 minuttir til FM í fjør, meðan tíðin hjá Sverra lá um góðar 43 minuttir.

Báðir ætla sær sjálvandi fyrst og fremst at gerast føroyskur meistari, men stuttligt hevði sjálvandi verið, at sláa trý ára gamla metið hjá Rógva. Báðir eru tó samdir um, at skal nýtt føroyskt met setast, ja so skulu nógvir »brikkar« fella uppá pláss komandi leygardag. Toppformurin skal rakast, veðrið skal vera tilvildar og onki óhapp má henda.

Enn hevur onki konufólk stilla upp í hesum »aldursbólkum« í ár, men møtur onkur upp, eru hesi hjartaliga vælkomin.

Kappingin byrjar kl. 15.00, og allir luttakarar skulu møta upp kl. 14.00.

Tilmelding fer fram á heimasíðuni hjá TSF, sum er: www.tsf.fo.

So gongur slag í slag. Leygardagin 23. august verður kappast í 100 km landavegsúkkling og leygardagin 30. august verður kappast um FM-heitið í býarsúkkling.

Um hálvan september skulu føroyskir súkklarar til Íslands at kappast ímóti bestu súkklarunum úr Íslandi.



# Alivinnan skal kannast



ALIVINNA
*Hans Kárason Mikkelsen*

Føroya Havbúnaðarfelag hevur júst samtykt, at arbeiðsbólkur skal setast fyri at kanna støðuna í kreppuraktu alivinnuni. Hetta upplýsir Jan Mortensen, formaður í Vinnuhúsinum, vegna Føroya Havbúnaðarfelag.

Arbeiðsbólkurin skal koma við uppskoti til tiltøk, sum kunnu bøta um støðuna í alivinnuni. Eitt líknandi tiltak varð sett í verk fyrst í 90'unum, tá alivinnan eisini var í kreppu. Tá skrivaði ein skjóttarbeiðandi bólkur frágreiðingina »Alivinnan – nútíð og framtíð«, ið gav vinnuni ta leiðbeiningina, sum varð neyðug fyri at tryggja tann vøksturin, sum alivinnan hevur sæð meginpartin av 90'unum.

Men nú kreppan í alivinnuni av álvara er við at gera um seg aftur, hevur Havbúnaðarfelagið sett ein arbeiðsbólk, ið skal tilmæla um, hvat skal gerast fyri at menna alivinnuna nú og yvir eitt longri áramál.

Limirnir í bólkinum eru Torbjørn Andreasen úr Føroya Banka, Ejvind Mouritsen úr Føroya Sparikassa og Virgar Dahl úr Tryggingarfelagnum Føroyar. Fyri Havbúnaðarfelagið eru umboðini í bólkinum Odd Eliassen, Atli Gregersen, og Jan Mortensen.

# Tríggir menn og ein kona



LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Í Ribarhúsi í Fuglafirði letur upp listaframsýning mikudagin 20. august. Listafólkini nevna framsýningina »Tríggir menn og ein kona«, og sum heitið sigur, so eru tað tríggir menn og ein kona, sum sýna fram, tey eru: Frits Johannesen, Heðin Kambsdal, Øssur Mohr og Kristina Joensen, sýna fram málningar.

Framsýninginn er opin til mikudagin 20. august, og verður opið mánadag til fríggjadag frá kl 15-17.30 og leygardag 11-13.

# Tólvti maður á Vertshúsinum



FÓTBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Í sambandi við landsdystin 20. august móti Íslandi fer 12 Maður at hita upp á Vertshúsinum hjá Restorff frá kl 15.00. Har verða ymisk tiltøk og sum vant fer 12. maður og allur hópurin í skrúðgongu niðan í Gundadal áðrenn dystin.

Aftan á dystin er aftur opið hús á Vertshúsinum, og tá fer Headache Blues Treo at spæla sigursblues.

12 Maður vónar nogv fólk fara at taka undir við tiltakinum.


Súlukort



Savna súlur til ókeypis ferðir



Nú kanst tú veiða súlu alt árið. Fyri hvørja ferð, tú fert við Atlantic Airways úr Vágum, fært tú eitt súlustempul í Súlukortið. Hetta er galdandi fyri ferðir til øll londini, ið Atlantic Airways flýgur til úr Føroyum. Kortið fæst frá Atlantic Airways á flogvøllinum. Tá ið tú hevur savnað saman fimm súlur í kortinum, fært tú eina ókeypis ferð báðar vegir á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Eisini eru onnur tilboð til teirra, ið hava Súlukort.

Feløg í Súluskipanini

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic